# Fløskupostur á land Yviri við Strond

**Tað var ein forkunnugur fongur, sjey ára gamli Egil Horn fekk í fjøruni Yviri við Strond í gjár. Ein fløskupostur, sendur úr Klaksvík á Sjómannadegnum í fjør, lá millum steinarnar, og hann fann Egil**



*Elsti bólkur úr Býlingshúsinum undir Fjalli. Frá vinstru: Anita Jónfinnsdóttir, Sólmay Johannesen, Kristoffur Bjørgvin, Egil Horn, Magni Steintún og Barbara Káradóttir Durhuus*



*7 ára gamli Egil Horn við fløskupostinum, sum hann fann Yviri við Strond*

FLØSKUPOSTUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kr. Vang*

Stutt eftir klokkan 13 í gjár, tá evstamark er farið, mesta rokið hæsað av, dagsins Sosialur sendur til prentingar og starvsfólkini í Miðlahúsinum so smátt eru byrjaði at fáa sær ein bita, koma brádliga seks glað og sera spent børn á gátt.

Tey eru ikki heilt ørindaleys nú tey í rokaklæðum, húgvum og bjargingarvestum, berandi alskyns lutir úr fjøruni koma stunandi inn. Ein av hesum lutum er tó serliga áhugaverdur, og áðrenn eg havi fingið orðið upp at spyrja, hvør hevur funnið hvat, hevur eitt av børnunum longu svarað, at tað er Egil, sum hevur funnið ein fløskupost.

Við børnunum eru Birna Mikkelsen og Asta Thomsen, og tær greiða mær frá, at tey hava verið í fjøruni og leitað eftir ymsum tilfari, ið tey skulu nýta til at gera páskaprýði við, tá Egil Horn fann henda fløskupostin.

Vit seta okkum niður við borðið, og skulu til at granska henda forvitnisliga post nærri, og tá fái eg at vita, at posturin ikki er fingin úr fløskuni enn. So er bara at gera skjótt av, og eftir góða hjálp frá fimum og smølum barnafingrunum, hava vit eftir nakrar fáar minuttir fingið brævið úr fløskuni.

### Til tann, ið tað viðkemur...

Við stórum spenningi hyggja hesi fittu børnini at, meðan eg varisliga rulli pappírið úr fløskuni út, og byrji at granska tað. Eg verði noyddur at taka til mín kunnleika í enskum, tá eg skal greiða teimum frá, hvat í brævinum stendur. Har stendur soleiðs skrivað, eins á øllum lepunum, ið vóru kastaðir út henda dagin.

»Hetta er eitt brævur úr Klaksvík, Føroyar. Føroya Sjómannadagur 17. august 2008. 62º 14,8'N og 6º 38,5' V«

So stendur víðari: »Mítt navn er Elma. Eg eri 6 ára gomul.«

Avsendari av hesum góða fløskuposti vísir seg at vera seks ára gamla Elma Hansen úr Klaksvík. Móttakarin er nú funnin, og tað gjørdist Egil Horn úr Havn, sum sjálvur júst er fyltur sjey.

Tá eg havi greitt teimum frá tí, ið brævinum stendur, er mesti spenningurin í hesum lítla gerandisævintýri av, og eftir at vit hava avmynda okkara fittu, smáu gestir, siga tey pent og blítt farvæl, og fara so spakuliga sjaggandi niðan eftir Tórsgøtu aftur, øll berandi onkran lut, ið tey hava funnið í fjøruni henda góðveðursdagin.

# Ljóðgóðska í heimsflokki til Norðurlandahúsið

**Norðurlandahúsið hevur við nýggjari samstarvsavtalu við Tryggingarfelagið Føroya fingið ljóðútgerð í heimsflokki. – »The Wall« er tað perfekta høvið til at royna nýggju útgerðina, sigur Niels Halm, stjóri í Norðurlandahúsinum**



*Íslendski rokkbólkurin Dúndurfréttir roynir nýggju ljóðútgerðina í Norðurlandahúsinium, og teir spara seg ikki*

*Mynd: Rógvi Nybo*

SAMSTARV
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

625.000 krónur. Tað er kostnaðurin á nýggju ljóðútgerðini, ið Norðurlandahúsið hevur fingið sum liður í nýggjari fýra ára samstarvsavtalu við Tryggingarfelagið Føroyar.

Í Norðurlandahúsinum hevur leingið verið eitt brennandi ynski um at kunna betra um ljóðgóðskuna í stóra salinum. Higartil hevur hátalarakapasiteturin í tí stóra salinum ikki altíð verið nøktandi, serliga til størri tónleikatiløk, har ofta hevur verið brúk fyri at leiga útgerð inn í húsið.

- Eftir 10 ár er neyðugt at endurnýggja og útvíðka ljóðanleggið. Men hetta er sera kostnaðarmikið. Tí fegnast vit um samstarvið við Tryggingarfelagið Føroyar, sum hevur givið okkum møguleika fyri at keypa nýggja ljóðútgerð sigur Niels Halm, stjóri í Norðurlandahúsinum.

Gamla ljóðútgerðin verður framvegis eisini nýtt, tó nú til at stuðla undir nýggju útgerðina.

Fyrsta tiltakið, ið fær møguleikan at nýta nýggja ljóðanleggið hjá Norðurlandahúsinum er framførslan av The Wall hjá Pink Floyd, sum Føroya Symfoniorkestur og íslendski rokkbólkurin Dúndurfréttir framføra í vikuskiftinum.

### Byggja brýr millum vinnu og mentan

Gunnar í Liða, forstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar, fegnast um nýggju avtaluna.

- Vit hava verið væl nøgdir við tað samstarv, vit høvdu frammanundan, og tá vit hoyrdu at Norðurlandahúsið hevði eitt ynski um eitt nýtt ljóðanlegg, sóu vit hetta sum ein gyltan møguleika at leingja um samstarvið. Við hesari avtalu kunnu vit framyvir byggja brúgv millum vinnu og mentan, og tað fegnast vit um, sigur Gunnar í Liða.

Hann vísir eisini á, at í fjør vóru omanfyri 60.000 fólk á gátt í Norðurlandahúsinum, og at har vóru líka undir 300 ymisk tiltøk. Tí sær hann hesa avtaluna sum nakað, ið allir partar fáa gott burturúr.

-Norðurlandahúsið, Tryggingarfelagið, listafólkini og Føroya fólk fáa nyttu av hesari avtalu, og tí eru vit sera fegin um hesa avtaluna, sigur Gunnar í Liða.

Sambært nýggju samstarvsavtaluni, sum millum annað inniber at Norðurlandahúsið hevur fingið møguleika at keypa nýtt ljóðanlegg til stóra salin, verður Tryggingarfelagið Føroyar eisini høvuðssamstarvsfelagið hjá Norðurlandahúsinum og tiltøkunum, ið húsið sjálvt skipar fyri, næstu fýra árini.